# Býráðið

**Dagfesting:** 24.09.2026 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Gudny Vang fyri Jastrid á Dalbø

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 22/26 | 26/00086-4 | Borgari søkjir um frávik til byggiloyvi. |
| 23/26 | 26/00444-2 | Keyp av matr. nr. 144 |
| 24/26 | 26/00169-17 | Ognartøka av matr. nr. 205 |
| 25/26 | 26/00337-1 | Tilgongd og karmar fyri 2027 |
| **Referatsager** | | |
| **Åben halv time** | | |
| | | |

1

**Til afgørelse**

## 22/26
## 26/00086-4 Borgari søkjir um frávik til byggiloyvi.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.09.2026 | 41/26 |
| 2 Býráðið | 24.09.2026 | 22/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eigari av matr. nr. 526 í Fuglafirrði ynskir at víðka um verandi sethús og er kunnaður um, at fleiri brunaviðurskiftir skulu, sambært BK17, gerðast fyri at lúka hesum krøvum.<br>Eigarin ynskir at fáa frávik frá BK17 og brunaviðurskiftinum sum eru galdandi, í samband við útbyggjan av verandi sethúsum. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Øll útsíðan sum eigarin ynskir at søkja um frávik frá, skal verða ein brunaveggur við brunaglasi í vindeygum ið ikki skulu kunna opnast, tí útveggurin er nærri enn 2,5 m frá grannamarki.<br><br>Grannin hevur bygning standandi á grannamarkinum, sum ikki líkur brunakrøvini í BK17, tí veggurin í mark, ikki er bygdur og ikki klassifiseraður sum brunaveggur, og líkur tí ikki brunakrøvini sum eru sambært BK17.<br><br>Av tí at grannin eisini hevur ein minni bygging standandi á grannamarki, eru tað krøv til bruna sum tryggjar brúkarin, um eldar skuldi komi í annan av hesum bygginum, og so er ikki brunatryggja frá nakrari síðu.<br><br>60 minuttir trygdin sum er við brunaveggi er heilt vekk.<br><br>Minsta frástøða frá granna er 0,9 m og størsta frástøða er 1,8 m, mált á kortið hjá fuglafordur.kort.fo.<br>Frástøðan til bygging til grannamark er 1,3 m<br><br>**Viðmæli:**<br>At veggur verður brunaveggur og fráviki kann verða at vindeyguni kunnu verða uttan sama brunaklassa sum útveggurin, tvs vindeyguni hava onga brunaflokk. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Fyrispurningur um at sleppa undan brunavindeygum í samband við útbygging – 31. August 2026<br>• Tekningar við viðmerkingum SOA | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at tekniska nevnd tekur støðu til um borgari skal fá frávik til vindeyguni. | | |
| Dagf | 04-09-2026 | | |

**Tekniska nevnd 07. september 2026:**
Tekniska nevnd tekur einmælt undir viðmælinum at geva frávik til vindeyguni, at tey ikki fáa ein brunaflokk.

3

**Býráðið 24. september 2026:**
Býráðið mælir til at grannhoyring verður gjørd og at málið verður útsett til komandi býráðsfund.

## 23/26
## 26/00444-2 Keyp av matr. nr. 144

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.09.2026 | 39/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2026 | 37/26 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 23/26 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Tekniskunevnd | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eigari, hevur ein fyrispurning til kommununa, um vit eru áhugaðir at keypa matr. 144, sum er 1807 fermetrar.<br>Stykki liggur sum nr. 2 í frástøðu frá Bøvegi.<br><br>Hettar stykki er sera áhugavert, at keypa um kommunan skal fremja ætlan um útstikking víðari frá Bøvegi, ið ætlanin er.<br><br>Talan er um dyrkaða jørð so keypsprísurin er 110,- kr/m2 = **198.770 kr** + gjøld til US. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Eigari sent inn fyrispurning til kommununa og Borgarstjórin ynskir at viðgerða hettar. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Mailur<br>• Kort frá kortal | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin, mælir tekniskunevndina til at viðgera og taka støðu til um kommunan skal keypa matr. nr. 144. | | |
| Dagf | 04.09.2026 | | |

4

**Tekniska nevnd 07. september 2026:**
Tekniska nevnd tók einmælt undir við at keypa matr.nr. 144.

**Fíggjarnevndin 16. september 2026:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við at keypa matr. Nr. 144.

**Býráðið 24. september 2026:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini um at keypa matr. nr. 144.

5

## 24/26
## 26/00169-17 Ognartøka av matr. nr. 205

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.09.2026 | 40/26 |
| 2 Býráðið | 24.09.2026 | 24/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Tekisku nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í samband við at kommunan arbeiðir við at ogna sær lendi Norðri í Gerði til byggilendi, tað er lendi frá Garða-, og Bjarnavegi, er ein matrikul har tinglýstu eigararnir eru deyðir.<br><br>Lendi vit tosa um er matr. nr. 205, eigara eru matr. nr. 206, og matr. nr. 207, í Oyndafirði.<br><br>Tá tað kemur til matr. nr. 206 er eigarin deyður, men kona og børn á lívi og fæst hendur á undirskriftunum. Verri er við matr. nr. 207 har eigarin doyði í 1974.<br>Børnini hjá eigaranum av matr. nr. 207 eru ikki øll á lívi og eitt abbabarn er eisini deytt.<br><br>Samskift hevur verði við tann sum umsitur matr. nr. 207 fyri arvingarnar. Tey eru samla 5 systkin/hálvsystkin. 4 av teimun búgva í FO, men tann í búði í DK doyði fyri nøkrum árum síðani, eitt barn hjá henni er eisini deytt.<br><br>Umsitarin av matr. nr. 207 hevur lítlar og ongar vónir um, møguleikan at fáa hendur á undirskriftum og skiftarættar váttan, tí er teirra uppskot at kommunan ognartekur lendi.<br><br>Samskifti hevur verði við umboð fyri eigaran av matr. nr. 206, um hvat tey siga til at vit ognartaka hettar stykkið. Hesin hevur tosa við mammu sína og systkin og tað er í lagi at kommunan ognartekur matrikulin.<br><br>Áheitanin til TN er, um at viðgerða hesa ognartøku og leggja hana fyri býráði um semja er um tað. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Borgarstjórin hevur haft samskift við eigarar av matr. nr. 205 og mælir til ognartøku. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 2. mai 2025 (§12)<br>• Kort yvir lendi | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin, mælir teknisku nevnd at viðgera og taka støðu til um kommunan skal ognartaka matr. nr. 205 | | |
| Dagf | 01.09.2026 | | |

**<u>Tekniska nevnd 07. september 2026:</u>**
Tekniska nevnd meirlutin í nevndini tók undir við tilmælinum. Eivin Breiðaskarð og Jóan Pauli Olsen tók undir við tilmælinum og Sonni á Horni tók ikki undir við tilmælinum.



**<u>Býráðið 24. september 2026:</u>**
Atkvøtt varð um málið har Gudny Vang, Ólavur Larsen, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Sonni á Horni atkvøddi ímóti meðan Ørvar Jacobsen atkvøddi blankt. Málið varð sostatt samtykt.

## 25/26
## 26/00337-1 Tilgongd og karmar fyri 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 32/26 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 07.09.2026 | 20/26 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.09.2026 | 43/26 |
| 4 Orku og umhvørvisnevndin | 07.09.2026 | 13/26 |
| 5 Mentamálanevndin | | |
| 6 Sosiala nevnd | 21.08.2026 | 18/26 |
| 7 Býráðið | 25.06.2026 | 1/26 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.09.2026 | 40/26 |
| 9 Býráðið | 24.09.2026 | 25/26 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndin |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tilgongdin at fáa eina strategiska og skynsama fíggjarætlan 2027 eigur at verða sett á dagskrá skjótast til ber.<br><br>Viðfest er upprit raðfestingar komandi árini, sum kunnu nýtast sum útgangsstøðið fyri kjakinum og stýring og raðfestingar komandi árini.<br><br>**Til fíggjarnevndarfund 16.09 2026**<br>Til karmarnar í 2026 skal fíggjarnevndin koma við uppskoti til:<br>• Skattaprosent<br>• Barnafrádrátt<br>• Rakstrar- og íløgukarm<br><br>Hetta skal gerast í mun til væntaðu fíggjarstøðuna hjá kommununi fyri 2027. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrislógini og kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot um ársfíggjarætlan fyri býráðið. Tí verður í góðari tíð lagt upp til, at taka støðu til eina tilgongd fyri arbeiðnum og uppskoti til fíggjarkarmar 2027. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:**<br>• Kommunustýrislógin<br>• Kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu<br>**Fylgiskjøl :**<br>• Fíggjarætlan TS 1234567 2027 – grundark.xlsx |

8

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • Fuglafjarðar kommuna fram móti 2030.word<br>• SV_ Lønarhækking 2027 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | J |
| | Umsitingarligar | n | ? |
| Tilmæli | Mælt verður til:<br>1. At fíggjarnevndin setir karmar fyri rakstrinum komandi árið út frá kendum fortreytum, so sum lønar- og prísvøkstri.<br>2. At fíggjarnevndin leggur eina tíðarætlan fyri arbeiðið við raðfestinum í einstøku nevndunum.<br>3. At dagar verða settir av í oktober-november at har býráðið saman við fyrisiting viðgerð og snikkar endaligu fíggjarætlanina fyri komandi ár.<br>**Til fíggjarnevndarfundin 16.09.2026**<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin umrøður og ger tilmæli um skattaprosent, barnafrádrátt, rakstra- og løgukarm fyri 2027. | | |
| Dagf | 16.06.2026 | | |



**<u>Fíggjarnevndin 18. juni 2026:</u>**

Fíggjarnevndin heitir á umsitingina um:

- At umsitingin framskrivar FÆ 2027 við 4% lønarvøkstri og kendum broytingum
- At heita á nevndirnar, innan 15. september,um at gjøgnumganga økini í mun til rakstur, harímillum kritisk at taka støðu til lønarkarmin.
- At nevndirnar, innan 15 september, gera yvirlit yvir løguynskir fyri 2027
- At  skipa fyri FÆ eksternat 22. og 23 oktober 2027

**<u>Orku og umhvørvisnevndin 07. september 2026:</u>**

Orku- og umhvørvisnevndin setti arbeiðsdag tann 15.09.26 til at arbeiða við FÆ27 og koma við einum tilmæli til fíggjarætlanina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2026:**
Skattaprosent:
Fíggjarnevndin var ikki á einum málið um skattaprocentið. Ólavur Larsen leggur upp til at skattaprocentið verður skorið við 0,25%. Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul halda fast við núverandi skattaprocent.

Barnafrádrátt:
Fíggjarnevndin var á einum málið um at barnafrádrátturin verður tann sami sum í inniverandi árið.

Rakstrarkarmur:
Lønirnar verða framskrivaðar við 4% og at karmurin annars verður tann sami sum inniverandi ár.

Løgukarmur:
Fíggjarnevndin ynskir at fáa ein skjótan fund við fíggjarmálaráðharran áðrenn løgukarmurin kann endaliga ásetast

**Býráðið 24. september 2026:**
Fyrst varð atkvøtt um minnilutauppskotið frá Ólavur Larsen fíggjarnevndarlimi, um at lækka skattaprosentið 0,25%. Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen, Gudny Vang og Ólavur Larsen atkvøddu fyri, meðan Dávur Juul , Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini um skattaprosent, saman við tilmælinum um rakstrar og løgukarmar. Eivin Breiðaskarð, Jóan Pauli Olsen, Eyðun á Lakjuni, Dávur Juul og Gudny Vang atkvøddu fyri, meðan Ólavur Larsen, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu blankt.

Referatsager

| Saknr | Arkivsak | Tittel |
|---|---|---|
| 2/26 | 26/00466-1 | Skipan av mentanarøkinum framyvir |

11

Fundurin lokin kl. 21.00

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen